

*Glaðir fraklendingar eftir finalusigurin á Danmark*

# Frakland vísir ræðandi styrki

**HONDBÓLTUR** Danska liðið stríddist manniliga í HM-finaluni, og longd leiktíð skuldi til, áðrenn fraklendingar aftur tryggjaðu sær gullið

Heri Simonsen

Danmark og Frakland spældu eina minniliga HM-finalu, sum var ein framúrskarandi reklama fyri altjóða hondbóltin. Aftaná vanliga leiktíð stóð á jøvnum 31-31. Frakland var væl betri í fyrra hálvleiki.

Frakland kom á odda 2-0 beinavegin, og Frakland hevði leiðsluna so at siga allan dystin. Ikki fyrr enn í næstseinasta sekundi javnaði Bo Spellerberg til 31-31. Danmark var ongantíð á odda í tí vanligu leiktíðini. Frakland var á odda 15-12 í steðginum, og tað tyktist sum teir høvdu tamarhald á støðuni, men seinasta korterið av vanligu leiktíðini gjørdi Danmark veruliga ein vørr.

Í longdu leiktíðini var Frakland á odda 34-33 aftaná teir fyrru fimm minuttirnar. Stutt frammanundan hevði Danmark verið á odda – fyri fyrstu ferð í dystinum – 33-32. Frakland legði seg framum 36-34. Danmark satsaði og fekk minkað til 36-35. Danir fingu ikki bóltin av fraklendingum í tí seinasta álopinum í dystinum. Ístaðin var tað Michael Guigou, sum setti bóltin í netið til 37-35, sum gjørdist endaliga úrslitið.

## Landin, Karabatic og Hansen

Niklas Landin í danska málinum átti veruliga sín lut í, at danska liðið kundi fylgja fraklendingum allan vegin.

Danski málverjin hevði 22 bjargingar, m.a. tvey brotskøst. Thierry Omeyer tók ikki líka nógv, sum Niklas Landin, men Thierry Omeyer hevði nakrar sera avgerandi bjargingar, ikki minst í tí longdu leiktíðini, tá Frakland vann sær eina tveymáls leiðslu.

Nikola Karabatic hjá Fraklandi og tann bert 22 ára gamli Mikkel Hansen hjá Danmark vóru báðir sera eyðsýndir. Teir skoraðu 10 mál í part. Nikola Karabatic var eitt satt arbeiðsgrev, og hann setti eina tjúkka posisjón undir sín ovurhonds stóra leiklut fyri tað franska liðið.

## Ikki síðani 1974

Frakland er fyrsta landið síðani Rumenia í 1974, sum endurvinnur heimsmeistaraskapið í manshondbólti. Og hevur landið víst eina ræðandi styrki síðani 2008.

Frakland hevur nú vunnið fýra meistaraheiti á rað. Olympiska meistaraskapið í 2008, heimsmeistaraskapið í 2009, europameistaraskapið í 2010 og nú aftur heimsmeistaraskapið í 2011.

Bulurin á hesum sterka franska liðnum verður inntaktur fram til olympisku leikirnar í London á sumri í 2012. Frakland verður tí liðið, sum vinnast skal á tey komandi endaspølini.

Danska liðið hevur tó nógvar ungar spælarar, sum geva vónir um, at eitt gullheiðursmerki kanska ikki er so ræðuliga langt burtur.

## Spania vann bronsu

Spania vann 24-23 á Svøríki í bronsufinaluni. Tað vóru tvey rættiliga troytt lið spældu sín níggjunda dyst uppá 16 dagar, og tað sást væl á báðum liðunum, tá HM-bronsan skuldi finna sín eigara. Tað leikaði stórt sæð javnt á allan dystin, og lítil málmunur var gjøgnum allar 60 minuttirnar. Støðan í hálvleikinum var javnleikur 11-11.

Spania hevði tvær trýmálsleiðslur í seinna hálvleiki, har liðið var á odda 16-13 og 19-16. Svenski málverjin, Johan Sjöstrand helt Svøríki inni í dystinum, og Svøríki kom uppá javnleik 22-22, tá fimm minuttir vóru eftir av dystinum.

Spania kom á odda 24-22, og tá kláraði Svøríki bara at svara aftur einaferð. Spania átti seinasta álopið í dystinum, og teir mistu ikki bóltin hesa løtuna, og tryggjaðu sær bronsuna.

## Ísland nummar seks

Ísland gjørdist nummar seks í HM-endaspælinum. Ísland tapti 33-34 ímóti Kroatia í dystinum um fimta plássið. Ungarn vann tann sera týðandi dystin ímóti Póllandi um sjeynda plássið, sum gevur beinleiðis atgongd til OL-endaspælið í London á sumri í 2012. Noreg vann 32-31 á Serbia í dystinum um níggjunda plássið.

Fýra norðurlond, Danmark, Svøríki, Ìsland og Noreg eru sostatt millum heimsins níggju bestu hondbóltstjóðir. Frægasta liðið uttanfyri Europa er Argentina, sum gjørdist nummar 12. Europa eigur sostatt 11 tey fremstu HM-liðini.

Hetta boðar frá góðum, tá EM-endaspælið verður í Serbia í døgunum 17. Til 29. januar í 2012.

## Frakland 35
## Danmark 37

31-31 (15-12)

**Frakland:** Nikola Karabatic 10, Michael Guigou 7, Luc Abolo 5, Jérome Fernandez 5, Bertrand Gille 4, Xavier Barachet 3, William Accambray 2

**Danmark:** Mikkel Hansen 10, Lars Christiansen 5, Bo Spellerberg 4, Jesper Nøddesbo 3, Anders Eggert Jensen 3, Hans Lindberg 3, René Toft Hansen 2, Lasse Boesen 2, Mads Christiansen 1

# Tríggir føroyingar danskir meistarar




*Torstein Brattaberg úr Vestmanna Róðrarfelag, Sverri Sandberg Nielsen úr Miðvágs Róðrarfelag og Anna Mary Davidsen úr Havnar Róðrarfelag gjørdust øll trý danskir meistarar í inniróðri, tá stóra DM-kappingin var í Gladsaxe leygardagin*

**KAPPRÓÐUR** Í stóru kappingini um danska meistaraheitið í inniróðri, sum var í Gladsaxe leygardagin, gjørdu tríggir føroyingar bart og vunnu ikki færri enn trý gullheiðursmerki

Hilmar Jan Hansen

Fyrst vann Torstein Brattaberg úr Vestmanna Róðrarfelag gull hjá teimum 15 ára gomlu, ið róðu 2000 metrar. Longu eftir fyrstu 500 metrarnar var hann farin hálvtsjeynda sekund fram um hinar, og munurin helt sær allan vegin, so hann at enda kom á mál við tíðini 6:35.5 minuttir – átta sekund frammanfyri nummar tvey.

Løtu seinni gjørdi Sverri Sandberg Nielsen úr Miðvágs Róðrarfelag honum kynstrið eftir við at vinna gull á 2000 metra teininum hjá teimum 18 ára gomlu. Her sást munurin á honum og restini so líðandi, men hann var alla tíðina á odda. Á málinum hevði hann tíðina 6:13.8, sum var 17-18 sekund betur enn hjá tí næstbesta!

Eisini kvinnurnar vóru við millum tey fremstu, tí Anna Mary Davidsen úr Havnar Róðrarfelag vann gull á 2000 metra teininum hjá kvinnum 19-22 ár við tíðini 6:58.9 minuttir. Eftir fyrstu 500 metrarnar var hon næstfremst, men var á odda, tá teinurin var hálvrunnin, og at enda var hon góð seks sekund framman fyri nummar tvey.

Umframt hesi, gjørdist Bergur Robert Dam Jensen nummar seks hjá monnum í lættvekt, og Vermund Vestergaard, Finnur Johannesen og Kári Brattaberg úr Vestmanna Róðrarfelag endaðu á sjeynda til níggjunda plássi í opna bólkinum hjá monnum.

Tilsamans 565 róðarar vóru við í kappingini í Gladsaxehøllini leygardagin, sum Bagsværd Roklub skipaði fyri í samstarvi við Concept 2 Danmark.

*hilmarjan@sosialurin.fo*